# IKEA KATALOGIÐ
# 60 ÁR Á BAKI

Í **60** ÁR HAVA FÓLK **DROYMT** SEG BURTUR Í LOKKANDI **IKEA-PRÍSLISTANUM**



**IKEA**
Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

Í ár eru tað 60 ár síðani, at heimsins største prentlutur, Ikea-katalogið, kom út á fyrsta sinni.

Blanka og litfagra blaðið, sum altíð er á tremur við freistandi innbúgvi, íblástri og hugskotum til innrætting av heiminum.

Hesin prentluturin, sum meiri enn nakað annað vekir »reiðurbyggjara-instinktið« hjá teimum, sum eru á einum vegamóti í lívinum. Sum, tá fyrsta barnið er á veg, tá tvey flyta saman, tá fyrsta kollegiikamarið skal innrættast ella tá onkur verður single aftur.

### Ikea í Føroyum

Hóast Ikea er ikki í Føroyum, er funktionella og lætta designið frá risastóru handilsketuni næstan obligatoriskt í føroyskum heimum. Líka frá sitrónpressuni úr fyrstu »starter-kit'inum« til »bygg-sjálv-køkin« og sengurnar í barnakømrunum. Fyri ikki at gloyma eyðkendu ljósu, norðurlendsku litirnar og toyvørurnar, sum hóska so væl til kremlitta stílin í nógvum føroyskum heimum.

Altíð í tíðarhóskandi sniði og í einari príslegu, sum føroyska handilslívið kann ikki kappast við.

### Speglar tíðina

Men hús- og heimarákið hevur ikki altíð verið kremlitt. Hesi 60 árini eru smakkurin sjálvandi broyttur nógv, umfram at permumyndirnar eisini siga nógv um tíðarandan hesi ymsu tíðarskeiðini – bæði politiskt, búskaðarliga og innan mótaheimin.

Her er eitt lítið yvirlit yvir søguna hjá Ikea og kataloginum hesi seinastu 60 árini.

## Heimsins største prentlutur

Fyrsta katalogið varð prentað í 250.000 eintøkum. Í dag er Ikea-katalogið heimsins største prentlutur. Katalogið verður prentað í 198 milliónum eintøkum á 27 málum.

## Altjóða brand

Í fjør vóru 590 milliónir vitjandi í teimum 301 handilshúsunum kring heimin

## Ikea søgan í stuttum

Søgan um Ikea byrjar í Svøríki í einum skógi í Smálandi í 1930'erne. Her súkklaði ein 5 ára gamal óviti runt og seldi grannunum svávulpinnar, pynt til jólatrø og blómufræ.

Drongurin var Ingvar Kamprad, og var tað sami drongur sum setti Ikea á stovn longu sum 17 ára gamal. Eins og í dag, var upprunaliga konseptið góðska fyri lítlan penga. Í dag er gott design og burðardygd hornasteinar í fyritøkuni umframt.

KELDA: IKEA

## So er!

**Kreativi parturin** av kataloginum fer fram í einum 8.000 fermetra stórum fotostudio í Älmhult í Svøríki
**Framleiðslan** av einum katalogi tekur umleið eitt ár
**Millum oktober og mars** byggir ein stórur hópur av handverkarum eini 200 ymsar innrættingar til katalogið
**Í kataloginum** eru umleið 4.000 myndir.